# Chevron borar við markið næsta summar




*Kortið vísir økini, har Chevron er fyristøðufelag báðumegin markið og har tað nú verða gjørdar seismiskar kanningar og seinni eisini boraðir brunnar.*
*Kelda Chevron*



*Transocean Rather, sum helst verður tøkur til at bora avmarkingarbrunn ella brunnar komandi vár í stóra fundinum nær markið Rosebank*
*Mynd Transocean*



*Western Pride, sum fer at gera sera framkomnar seismiskar kanningar á landgrunninum og í bretskum øki komandi tveir mánaðirnar.*
*Mynd Westen Geco*

BORING

*Jan Müller*
*Jan@sosialurin.fo*

Amerikanska oljufelagið Chevron, sum gjørdi eitt stórt oljufund bretsku megin markið á Atlantsmótinum í fjør, er um at fáa avtalu við boripallfyritøkuna Transocean um at leiga boripallin Transocean Rather til at bora fleiri avmarkingarbrunnar á Rosebank/Lochnagar oljufundinum. Hetta liggur bert fáar kilometrar frá føroyska markinum og hevur verið nevnt, at møguleiki er fyri, at oljukeldan eisini gongur inn á føroyskt øki.

Sambart blaðnum Upstream vilja keldur vera við, at Chevron er við at gera ein endaligan sáttmála um at bora fleiri brunnar, og sum skilst møguliga tríggjar. Teir skulu so gera av, hvussu stórt fundið er, og út frá hesum kann Chevron saman við partnarunum í loyvinum, Statoil, Dong og OMV, gera av, nær man kann fara undir eina útbyggingarætlan. Tað ljóðar, at fyrsti brunnurin skal longu borast í mars næsta ár. Ruth Parkhouse frá Chevron váttar fyri Sosialinum, at tey eru í samráðingum við borifelag um at bora ein brunn næsta ár. Enn er eingin endalig avtala gjørd. Ætlanin var at bora í summar men eingin pallur hevur verið tøkur.

Tað hevur verið sera torført at fáa boripallar til hetta farvatnið, og kostnaðurin er farin heilt í topp, nú eftirspurningurin er so stórur. Dagratan er omanfyri 300.000 dollarar. Hetta er nærum trýfalt vanliga prísin.

Samtíðis sum arbeitt verður við at fáa endaliga avtalu um boripall hevur Chevron gjørt avtalu við Western Geco um at gera seismiskar kanningar við Western Pride í loyvum sínum bæði í føroyskum og bretskum øki. (sí kort)

Keldur Sosialurin hevur tosað við halda, at gongst væl í hond við kanningunum, og fæst ein avtala um at bora avmarkingarbrunnar næsta ár á Rosebank/Lochanager fundinum, so er møguleiki fyri, at Chevron og tess partnarar fara at bora í loyvinum føroysku megin markið longu í 2007.

**Starvsfólk**

TIL SUNSET BOULEVARD Í SMS

**Fulla tíð**

Søkt verður fólki M/K í aldrinum 18 ár og eldri, til fulltíðarstarv - at byrja skjótast tilber. Ert tú opin, virkin, røkin og dámar væl at arbeiða, har tað veruliga hendir nakað, so er hetta tað. Tað ger onki, um tú hevur hóskandi royndir. Vit seta teg inn í okkara arbeiðsmannagongdir og eftir hetta gerst tú eitt av álitisstarvsfólkum okkara.
Vit gleða okkum at hoyra frá tær...

Send umsóknina til:
Sunset Boulevard, SMS, Postboks 1059, 110 Tórshavn,
ella far inn á www.sms.fo og útfyll eitt umsóknarskjal.